# Tað er fantastiskt at eiga Havnina

**HONDBÓLTUR** Marjun Danberg er sera fegin um sigurin á Kyndli. – Vit eiga Havnina, og tað er fantastiskt, sigur hon

Uni Holm Johannesen

Neistin vann slagið um høvuðsstaðin.

Munurin var greiður. Átta mál skiltu liðini.

Marjun Danberg, Neistin, er fegin.

– Vit hava ofta havt trupulleikar við Kyndli seinastu árini. Vit prógvaðu í dag, at vit eru betri, enn vit hava síðst í seinastu grannuppgerðunum, sigur hon við heimasíðuna hjá Neistanum.

Úrslitið var 29-21. Neistin fór frá grannunum so líðandi, og tað var ongantíð líkt til, at Kyndil fekk stig.

### Mistu bóltar

Ein av trupulleikunum hjá Kyndli var, at liðið hevði lítið tol í álopsspælinum. Tær tveittu ov nógvar bóltar burtur, og tá verjuparturin ikki fekk tamarhald á Barbaru Brauer, 10 mál, og Jacklin Durhuus, sjey mál, hevði Kyndil ongan møguleika.

Marjun Danberg sigur, at Neistin vísti sína styrki.

– Tað er heilt fantastiskt at vinna so greiðan sigur. Vit eiga Havnina, og tað er fantastiskt. Næsti dysturin er móti Kyndli í steypakappingini, og tá fara vit eisini at vísa, hvar skápið skal standa, sigur Marjun Danberg við neistin.fo.

Tá liðini hittust fyrr í hesum kappingarárinum, vann Neistin við tveimum málum – 20-18.

*uni@sosialurin.fo*

# Neistin bukaði grannarnar

**HONDBÓLTUR** Heili 13 mál vóru á muni, tá Neistin vann á Kyndli. Greiði sigurin var ongantíð í vanda



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Uni Holm Johannesen

Kyndil er einsta liðið í hesum kappingarárinum, sum hevur stolið stig frá Neistanum.

Verandi greipuvinnararnir hava verið einaráðandi. Liðið hevur mist eitt stig. Tað var í grannadystinum móti Kyndli.

Tað var vónað, at grønlittu havnarmenninir fóru at endurtaka bragdið hesaferð.

Tað varð hinvegin skjótt greitt, at tað fór ikki at henda hesaferð.

Neistin setti ferð á alt fyri eitt og rann grannarnar um koll.

### Skotstyrkin

Heini Hanusarson, David Edvardsen og Heini Ragnarsson gingu undan hjá Neistanum hesaferð.

Álopsspælið hjá oddaliðnum var skipað, og Kyndil kláraði ongantíð at verja fyri skjúttunum.

Dysturin var avgjørdur longu í fyrra umfarinum. Støðan í hálvleikinum var 20-11.

### Kyndil rennur aftaná

Avrikini hjá Kyndli hava verið sera óstøðug higartil.

Serliga seinastu umførini hevur gingið illa í hond hjá liðnum. Úrslitini hava havt við sær, at Kyndil er dragnað í stríðnum um finalupláss.

Fimm stig skilja Kyndil og KÍF, sum er nummar tvey.

Næsti landskappingardystur verður 9. januar. Tá tekur H71 ímóti grønlittu grannunum.

*uni@sosialurin.fo*

# KÍF aftur á beint

**HONDBÓLTUR** Kollfirðingar vunnu seg aftur á beint aftaná tveir ósigrar upp í slag. KÍF vann við fimm málum á Skála

Uni Holm Johannesen

Jan Ottesen, venjari, og kollfirðingar vunnu sær tvey týdningarmikil stig hesaferð.

Liðið hevur tapt fyri Neistanum og VÍF seinastu vikurnar, og tað hevur havt við sær, at hini liðini otaðu seg eitt sindur nærri finaluplássinum, sum kollfirðingar annars hava sitið trygt á higartil.

### Togaðust allatíð

StÍF hevur bara vunnið tríggjar landskappingardystir.

Í fyrsta umfarinum vunnu strandingar á H71. Síðan hevur liðið koppað Team Klaksvík tvær ferðir. Fortreytirnar fyri einum sigri vóru góðar hjá KÍF.

Liðini togaðust hinvegin um leiðsluna allatíðina, og tað var ikki fyrr enn miðskeiðis í seinna hálvleiki, at kollfirðingar langt um leingi fóru undan mótstøðuliðnum.

## SUNSET DEILDIN

### **Kyndil – Neistin** 21-29 (12-18)

Høllin á Hálsi, Tórshavn
Dómarar: Andrias F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 3-5**
**20 min.: 7-11**
**40 min.: 15-23**
**50 min.: 16-27**

**Kyndil:** Guðrið Eystberg 7, Jórun Ludvig 4, Turið Arge 3, Randi S. Wardum 3, Heidi Maria Akselsen 2, Anja Heinadóttir 1, Súsanna Petersen 1.
**Neistin:** Barbara Brauer 10, Jacklin Durhuus 7, Rakul Magnussen 4, Katrin á Neystabø 3, Marjun Danberg 2, Jenny Kragesteen 1, Bára Hansen 1, Birita Wardum 1.
Útvísingar: Kyndil 0 – Neistin 2

### **StÍF – VB** 10-18 (5-9)

Ítróttarhøllin á Skála
Dómarar: Magnus í Króki og Thomas Juul Thomsen

**10 min.: 1-1**
**20 min.: 4-5**
**40 min.: 6-13**
**50 min.: 8-16**

**StÍF:** Fríðrún Danielsen 5, Bára Berthelsen 2, Birna Tummasardóttir 1, Asgerð Káradóttir 1, Jana Dam 1.
**VB:** Gintare Lydekaite 5, Rannvá Johannesen 4, Bára K. Mortensen 4, Una Egilsdóttir 2, Svava Vestergaard 2, Justina Balzarviciute 1.

### **Tjaldur – Stjørnan** 28-24 (12-11)

Runavík
Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 2-2**
**20 min.: 7-6**
**40 min.: 16-15**
**50 min.: 22-19**

**Tjaldur:** Adina Petrea 10, Simona Petersen 6, Benadikta Johannesen 4, Annika thomsen 4, Heidi Sevdal 3, Sarah Ann Thomsen 1
**Stjørnan:** Nicoleta Radu Hansen 6, Valentina Siciu 6, Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 4, Durita Christophersen 2, Bára Skaale Klakstein 1, Durita Mikkelsen 1
Útvísingar: Tjaldur 6, Stjørnan 5

## ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

### **Kyndil – Neistin** 30-42 (11-20)

Høllin á Hálsi, Tórshavn
Dómarar: Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 3-6**
**20 min.: 8-13**
**40 min.: 19-28**
**50 min.: 25-37**

**Kyndil:** Bárður Johannesen 8, Høgni Klein-Olsen 5, Andrias Sólsker 4, Rúni Johansen 4, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Josef Abrahamsen 3, Hans Arni B. Thomsen 2.
**Neistin:** Heini Hanusarson 10, David Edvardsen 9, Heini Ragnarsson 7, Áki Mørk 5, Finnur Hansson 3, Jugoslav Djumic 3, Sjúrður Thomassen 3, Ingi Olsen 2.
Útvísingar: Kyndil 3 – Neistin 2

### **StÍF – KÍF** 22-27 (12-12)

Ítróttarhøllin á Skála
Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**10 min.: 4-4**
**20 min.: 9-9**
**40 min.: 14-17**
**50 min.: 18-21**

**StÍF:** Jóanes Prestá 8, Leivur Justinussen 7, Artur Johansen 2, Alexandur Johansen 2, Jón Rasmussen 1, Jørmund Joensen 1, Marius Joensen 1.
**KÍF:** Gert Hansen 9, Teitur Joensen 5, Andrias Nielsen 3, Rúni Joensen 2, Jákup Trygvason 2, Ási Dam 2, Agnar Joensen 2, Tony Weihe 1, Niklas Reginsson 1.
Útvísingar: StÍF 5 – KÍF 7

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 12 | 359 | 28 | 75 | 20 |
| 2 | Tjaldur | 12 | 338 | 269 | 69 | 19 |
| 3 | Neistin | 12 | 330 | 279 | 51 | 19 |
| 4 | VB | 12 | 289 | 293 | -4 | 11 |
| 5 | Kyndil | 12 | 293 | 289 | 4 | 10 |
| 6 | VÍF | 12 | 276 | 343 | -67 | 4 |
| 7 | StÍF | 12 | 220 | 348 | -128 | 1 |

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 12 | 432 | 329 | 103 | 23 |
| 2 | KÍF | 12 | 338 | 304 | 34 | 17 |
| 3 | VÍF | 12 | 331 | 301 | 30 | 12 |
| 4 | Kyndil | 12 | 312 | 310 | 2 | 12 |
| 5 | H71 | 11 | 293 | 292 | 1 | 12 |
| 6 | StÍF | 12 | 299 | 310 | -11 | 6 |
| 7 | Team Klaksvík | 11 | 238 | 397 | -159 | 0 |